| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 10. desember 2012 |
| Býráðsfundur nr. | 14/2012 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

## Mál nr. 49/2012 ( J.nr. 2012-0002-0071).

**Mál viðvíkjandi skipan av býráðnum valskeiðið 01. januar 2013 til 31. desember 2016.**

Ár 2012 tann 10. desember kl. 16.00 kom nývalda býráðið saman til fundar.

**Møtt vórðu:**

**Fyri lista A:**
Dánjal Vang
Birgir Petersen

**Fyri lista B:**
Sigurð S. Simonsen
Eyðun á Lakjuni

**Fyri lista D:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Petur Abrahamsen
Sigga Óladóttir Joensen
Árant Berjastein

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

Nývaldu býráðslimirnir fyri Fuglafjarðar kommunu hava móttikið niðanfyri standandi skriv frá Sonna á Horni, fyrst valda býráðslimi, dagfest 27. november 2012, broytt dato við telduposti, dagfestum 30. november 2012:

Undirritaði Sonni á Horni havi móttikið valbræv frá Kommunuvalnevndini, dagfest 15. november 2012, hvar gjørt verður kunnugt, at eg við býráðsvalið tann 13. november 2008 eri valdur sum limur í býráðið fyri Fuglafjarðar kommunu fyri valskeiðið 01. januar 2013 til 31. desember 2016, hetta sambært § 12, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri.

Sambært somu grein og sama petti í omanfyri nevndu løgtingslóg verður fráboðað, at eg somuleiðis eri valdur á lista D við limanummar 1, og vísandi til løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri áliggur tað mær sum fyrst valdi at kalla nývalda býráðið saman til sín fyrsta fund.

Vísandi til omanfyri standandi loyvi eg mær hervið at kalla nývalda býráðið saman til fundar mánadagin **tann 10. desember 2012 kl. 16.00** við niðanfyri standandi dagskrá:

1. ***Val av formansskapi***
2. ***Val av føstum nevndum***
3. ***Val av umboðum og øðrum nevndum.***

## Ad 1
**Val av formansskapi sambært Kapitul 2 – kommunustýri § 6, stk. 2 og 3.**

- ***Fram fór val av borgarstjóra***

Uppskot frá  Magnus S. Midjord á lista D um at velja Sonna á Horni á lista D til borgarstjóra valskeiðið 2013-2016.

**Avgerð:**
Samtykt varð at velja Sonna á Horni til borgarstjóra valskeiðið 2013-2016. (9-0). Sostatt er Sonni á Horni valdur til borgarstjóra valskeiðið 2013-2016.

- **Fram fór val av varaborgarstjóra**

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja Magnus S. Midjord á lista D til varaborgarstjóra valskeiðið 2009-2012.

**Avgerð:**
Upskotið varð samtykt (9-0). Sostatt er  valdur til varaborgarstjóra valskeiðið 2013-2016.

- **Fram fór val av 2. varaborgarstjóra**

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja Siggu Óladóttir Joensen á Lista D til 2. varaborgarstjóra valskeiðið 2013-2016.

**Avgerð:**
Samtykt varð at velja Siggu Óladóttir Joensen (9-0). Sostatt er Sigga Óladóttir Joensen vald til 2. varaborgarstjóra valskeiðið 2013-2016.

## Ad. 2.
**Val av føstum nevndum sambært Kapitul 6 – nevndir § 28, stk. 2.**

- ***Val av fíggjarnevnd:***

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja Sonna á Horni á lista D (borgarstjórin er fastur limur í nevndini og formaður), Magnus S. Midjord á lista D og Árant Berjastein sum fastar limir, meðan skotið verður upp, at Petur Abrahamsen verður varalimur fyri Magnus S. Midjord og Sigga Óladóttir Joensen verður varalim fyri Árant Berjastein.

Nevndin skipar seg sjálv sambært § 28, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, fíggjarnevndin tó sambært § 38, stk. 1, pkt. 2. (borgarstjórin fastur limur og formaður).

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0). Sosatt verður fíggjarnevndin mannað við Sonna á Horni, Magnus S. Midjord og Áranti Berjastein sum føstum limum, og Peturi Abrahamsen og Siggu Óladóttir Joensen sum varalimum fyri ávikavist Magnus S. Midjord og Árant Berjastein valskeiðið 2013-2016.

- ***Val av teknisku nevnd:***

Uppskot frá Sonna á Horni um at velja Petur Abrahamsen og Siggu Óladóttir Joensen á lista D og Dánjal Vang á lista A sum fastar limir og Magnus S. Midjord á lista D sum varalim fyri Petur Abrahamsen, Árant Berjastein á lista D sum varalim fyri Siggu Óladóttir Joensen og Birgir Petersen á lista A sum varalim fyri Dánjal Vang.

Nevndin skipar seg sjálv sambært § 28, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við formanni og næstformanni.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0). Sostatt verður tekniska nevndin mannað við Peturi Abrahamsen, Siggu Óladóttir Joensen og Dánjali Vang sum føstum limum, og Magnusi S. Midjord. Árant Berjastein og Birgir Petersen sum varalimir fyri ávikavist Petur Abrahamsen, Siggu Óladóttir Joensen og Dánjal Vang valskeiðið 2013-2016.

- ***Val av vinnunevnd:***

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja Magnus S. Midjord á lista D, Sigurð S. Simonsen á lista B og Birgir Petersen á lista A sum fastar limir og Árant Berjastein á lista D, sum varalim fyri Magnus S. Midjord, Eyðun á Lakjuni á lista B sum varalim fyri Sigurð S. Simonsen og Dánjal Vang á lista A sum varalim fyri Birgir Petersen.

Nevndin skipar seg sjálv sambært § 28, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við formanni og næstformanni.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0). Sostatt verður vinnunevndin mannað við Magnusi S. Midjord, Sigurði S. Simonsen og Birgir Petersen sum føstum limum, og Áranti Berjastein, Eyðuni á Lakjuni og Dánjali Vang sum varalimir fyri ávikavist Magnus S. Midjord, Sigurð S. Simonsen og Birgir Petersen valskeiðið 2013-2016.

Neyðugt verður at gera broytingar í Kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu, har havnanevndin verður broytt til vinnunevnd, og har henda skal verða viðgjørd á 2 býráðsfundum við í minsta lagi 14 daga millumbili.

- ***Val av mentamálanevnd:***

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja Árant Berjastein á lista D, Birgir Petersen á lista A og Eyðun á Lakjuni á lista B, sum fastar limir, og Siggu Óladóttir Joensen, Dánjal Vang og Sigurð S. Simonsen sum varalimir fyri ávikavist Árant Berjastein, Birgir Petersen og Eyðun á Lakjuni.

Nevndin skipar seg sjálv sambært § 28, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við formanni og næstformanni.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0). Sostatt verður mentamálanevndin mannað við Áranti Berjastein, Birgir Petersen og Eyðuni á Lakjuni sum føstum limum, og Siggu Óladóttir Joensen, Dánjali Vang og Sigurð S. Simonsen sum varalimir fyri ávikavist Árant Berjastein, Birgir Petersen og Eyðun á Lakjuni valskeiðið 2013-2016.

- ***Val av sosialari nevnd:***

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja Siggu Óladóttir Joensen og Petur Abrahamsen á lista D og Dánjal Vang á lista A sum fastar limir, og Árant Berjastein, sum varalim fyri Siggu Óladóttir Joensen, Magnus S. Midjord sum varalim fyri Petur Abrahamsen og Birgir Petersen sum varalim fyri Dánjal Vang.

Nevndin skipar seg sjálv sambært § 28, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við formanni og næstformanni.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0). Sostatt verður sosiala nevndin mannað við Siggu Óladóttir Joensen, Peturi Abrahamsen og Dánjali Vang sum føstum limum og Árant Berjastein, Magnusi S. Midjord og Birgir Petersen sum varalimir fyri ávikavist Siggu Óladóttir Joensen, Petur Abrahamsen og Dánjal Vang valskeiðið 2013-2016.

**Ad 3.**
**Val av øðrum nevndum og umboðum sambært Kapittul 7 – § 38, stk. 2.**

- ***Val av tilbúgvingarráði:***

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja Petur Abrahamsen á lista D og Birgir Petersen á lista A, eitt umboð fyri løgregluna er fastur limur, Jóhan Clementsen, brunastjóri er somuleiðis fastur limur. Borgarstjórin er sambært kommunustýrislógini/brunareglugerðini fyri Fuglafjarðar kommunu fastur limur og formaður í nevndini.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- ***Val av barnaverndarnevnd:***

Í hesi nevnd sita 5 limir og 5 varalimir.

Nýggj barnaverndarlóg samtykt í Løgtinginum við gildiskomu fyri meginpartin av lógini tann 1. januar 2006.

Fuglafjarðar- og Leirvíkar kommunur hava gjørt avtalu um felags barnaverndartænastu undirskrivað partanna millum á fundi tann 16. november 2005, og hesi viðurskifti bera við sær, at Fuglafjarðar kommuna fær 3 limir í nevndina, meðan Leirvíkar kommuna fær 2 limir.

Í sambandi við, at Eysturkommunan varð veruleiki eftir 01. januar 2009, hevur Leirvíkar kommuna sagt samstarvið um barnaverndartænastuna upp til 31. desember 2008. Sostatt hevur býráðið valt nevndina sambært kommunustýrisskipanina. Møguleiki er tó at broyta § 31. 1. petti í kommunustýrisskipanini til 3-5 limir og varalimir. Broytingin krevur 2 býráðsviðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Við tað at barnaverndarlógin er broytt, so verður barnaverndarnevndin bert vald fyri tíðarskeiðið 01. januar til 31. desember 2013. Við tað at barnaverndarøkini eftir 01. januar 2014 skulu hava í minsta lagi 3000 borgarar móti verandi 1.500, so verður neyðugt at fara í samstarv, antin við Eysturkommunu ella við kommunurnar í Eysturoynni.

Uppskot frá frá Sonna á Horni á lista D um at velja niðanfyri standandi í nevndina:

| **Fastir limir:** | **Varalimir:** |
|---|---|
| Diana Hansen | Unn E. Petersen |
| Hans Jacob Poulsen | Elibert Kerá |
| Ásla Sevdal | Kristbjørg Petersen |

Nevndin skipar seg sjálv sambært § 28, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við formanni og næstformanni.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- ***Val av Ráðgevandi umhvørvisnevnd:***

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja Gudny Vang, Petur Abrahamsen og William S. Askham í nevndina.

Nevndin skipar seg sjálv sambært § 28, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við formanni og næstformanni.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- **Val av "Valstýri til løgtingsval fyri Fuglafjarðar valdømi" umfatandi Fuglafjørð og Kambsdal:**

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja niðanfyri standandi limir og varalimir í valstýrið.

| **Fastir limir:** | **Varalimir:** |
|---|---|
| Kristian Petersen | Dan Reinert Petersen |
| Borghild Hansen | Edmund Abrahamsen |
| Jógvan Finnur Poulsen | Símun Fornagarð |
| Bjørghild Arnholdtsdóttir | Helle H. Poulsen |
| Steintóra H. Nesá | Símun Abrahamsen |

*Kristian Petersen er formaður í valstýrinum*

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- **Val av "Valstýri til fólkatingsval fyri Fuglafjarðar valdømi" umfatandi Fuglafjørð og Kambsdal:**

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja niðanfyri standandi limir og varalimir í valstýrið.

| **Fastir limir:** | **Varalimir:** |
|---|---|
| Kristian Petersen | Dan Reinert Oetersen |
| Borghild Hansen | Edmund Abrahamsen |
| Jógvan Finnur Poulsen | Símun Fornagarð |
| Bjørghild Arnholdtsdóttir | Helle H. Poulsen |
| Steintóra H. Nesá | Símun Abrahamsen |

*Kristian Petersen er formaður í valstýrinum*

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- **Val av "Valstýri til løgtingsval fyri Hellurnar valdømi":**

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja niðanfyri standandi limir limir í valstýrið.

**Fastir limir:**
Atli Johannesen
Símun Hans Jacobsen
Hansina Kerá
Jórun Eið Johannesen

Jórun Eið Johannesen er forkvinna í valstýrinum.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- ***Val av "Valstýri til fólkatingsval fyri Hellurnar valdømi":***

Uppskot frá um at velja niðanfyri standandi limir limir í valstýrið.

**Fastir limir:**
Atli Johannesen
Símun Hans Jacobsen
Hansina Kerá
Jórun Eið Johannesen

Jórun Eið Johannesen er forkvinna í valstýrinum.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- ***Val av Kommunuvalnevnd fyri Fuglafjarðar kommunu:***

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja niðanfyri standandi limir og varalimir í kommunuvalnevndina.

| **Fastir limir:** | **Varalimir:** |
|---|---|
| Terji á Lakjuni | Poul Jákup Mohr |
| Jórun Eið Johannesen | Hansina Kerá |
| Elin Gaard Sleire | Jónfríð Jacobsen |

Terji á Lakjuni er formaður fyri kommunuvalnevndini.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0)

- **Val av kommunuvalstýri fyri Fuglafjørðar valdømi:**

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja niðanfyri standandi limir og varalimir í kommunuvalstýrið fyri Fuglafjarðar valdømi:

| **Fastir limir:** | **Varalimir:** |
|---|---|
| Terji á Lakjuni | Marjun R. Petersen |
| Jónfríð Jacobsen | Bogi Lervig |
| Elin Gaard Sleire | Heidi Nón |
| Poul Jákup Mohr | Eyðfríð Vík |
| Edva Jacobsen | Helle Poulsen |

Terji á Lakjuni er formaður í kommunuvalstýrinum.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- **Val av kommunuvalstýri fyri Hellurnar valdømi:**

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja niðanfyri standandi limir í kommunuvalstýrið fyri Hellurnar valdømi:

**Fastir limir:**
Atli Johannesen
Símun Hans Jacobsen
Hansina Kerá
Jórun Eið Johannesen

Jórun Eið Johannesen er forkvinna í kommunuvalstýrinum.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- **Val av umboðum í Hallarnevndina:**

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja niðanfyri standandi limir og varalimir í Hallarnevndina (Ítróttar-og samkomuhøllina á Kambsdali).

| **Fastir limir:** | **Varalimir**: |
|---|---|
| Dánjal Vang | Eyðun á Lakjuni |
| Birgir Petersen | Petur Abrahamsen |

Nevndin skipar seg sambært viðtøkur fyri Ítróttar- og samkomuhøllina við formanni og næstformanni á fyrsta fundi í 2009, sum hildin verður saman við umboðum fyri Eysturkommununa.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- **Val av Kommunalari ferðslunevnd:**

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja Ruth hansen, Tórfríður Abrahamsen og Steintór Jacobsen, sýslumann umboðandi løgregluna.

Nevndin skipar seg sjálv sambært § 28, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við formanni og næstformanni.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- **Val av Hellunevnd**:

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja Elibert Kerá og Jórun Eið Johannesen. Borgarstjórin er fastur limur. Í hesum sambandi verður víst til § 37, stk. 2 í kommunulógini um staðbundnar nevndir.

Nevndin skipar seg sjálv sambært § 28, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við formanni og næstformanni.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- **Val av hegnsýnisnevnd:**

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja niðanfyri standandi føstu og varalimir í nevndina:

| **Fastir limir:** | **Varalimir:** |
|---|---|
| Samson Mikkelsen | Asbjørn Berthelsen |
| Mortan Berjastein | Finnur Gudmundsson |
| Bjarni S. Joensen | |

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- **Umboð í stýrið fyri Kommunusamskipan Føroya:**

*Borgarstjórin er fastur limur sambært viðtøkur felagsins*.

Sambært galdandi viðtøkum fyri felagsskapin frá 10. juni 1999, broyttar 22. mars 2001 og 26. mars 2004, er borgarstjórin sambært § 6 fastur limur í stýrinum fyri KSF, meðan býráðsskrivarin sambært § 8 somuleiðis luttekur saman við borgarstjóranum á stýrisfundum og er limur í starvsbólkinum, sum er tilmælandi yvir fyri stýrinum.

- **Umboð í Interkommunala Renovatiónsfelagsskapin:**

***Borgarstjórin hevur atkvøðuræt***t á aðalfundi og eykaaðalfundum. Annars stendur tað øllum býráðslimum frítt at møta á omanfyri nevndu fundum. Um borgarstjórin hevur forfall verður atkvøðurætturin latin øðrum býráðslimi.

- **Val av umboði og varaumboði í Elfelagið SEV.**

***Borgarstjórin hevur atkvøðurætt*** á aðalfundi og eykaaðalfundum. Annars stendur tað øllum býráðslimum frítt at møta á omanfyri nevndu fundum.

- **Val av umboði í Ráðið fyri ferðslutrygd**:

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja Petur Abrahamsen á lista D sum umboð kommununar og Asbjørn Berthelsen sum varalim.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- **Val av umboði og varaumboði í stýrið fyri Eysturoyar Røktar- & Ellisheim:**

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja niðanfyri standandi fasta og varalim i stýrið:

**Fastur limur:**
Sigga Óladóttir Joensen

**Varalimur**:
Petur Abrahamsen

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- **Upptøkunevndin fyri eldrasambýlið Vesturstova:**

Sambært kunngerð nr. 67 frá 18. mei 2006 um eldrasambýli, skulu 5 limir manna nevndina. 3 umboð við røktarfakligari útbúgving tilnevnd av kommununi, avvarðandi økisleiðari og ein kommunulækni tilnevndur av landsstýrismanninum í almannamálum.

Víst verður annars til Viðtøkurnar fyri Vesturstovu § 5, stk. 3 um hesi viðurskifti.

***Fyri Heimarøktina**: Ása Hanusson, økisleiðari*
***Kommunulæknin**:*
Fyri kommununa: Marianna Hansen, sjúkrarrøktarfrøðingur
Fyri kommununa: Unna Næs Petersen, sjúkrarrøktarfrøðingur
Fyri kommununa: Kristbjørg Petersen, sjúkrarrøktarfrøðingur

Kommunalu umboðini í nevndina verða vald vald av býráðnum, og avgerðin verður fráboðað landsstýrismanninum í heilsumálum, sum síðan endaliga fráboðar teimum valdu um avgerðini.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- **Val av umboði og varaumboði í Ferðavinnuna fyri Eysturoy:**

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja niðanfyri standandi umboð og varaumboð:

**Fast umboð:**
Dánjal Vang

**Varaumboð:**
Asbjørn Berthelsen

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- **Val av umboði og varaumboði í nevndina fyri Næmingaheimið á Kambsdali:**

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja niðanfyri standandi umboð og varaumboð:

**Fast umboð:** Birgir Petersen

**Varaumboð:** Petur Abrahamsen

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- ***Val av eygleiðari í nevndini fyri Fuglafjarðar sjónleikarafelag (Mentanarhúsið):***

Uppskot um val av eygleiðara fellur burtur, av tí at Fuglafjarðar kommuna hevur yvirtikið Mentanarhúsið tann 15. desember 2011, og at tað í hesum sambandi verður víst til reglugerðina fyri "Mentanarhúsið í Fuglafirði", sum samtykt er av býráðnum tann 28. februar 2012 við seinni broyting.

- **Val av limi og varalimi í Skattakærunevndin fyri Eysturoy:**

Uppskot frá valbólkinum listunum A,B og K um at velja niðanfyri standandi lim og varalim í Skattakærunevndina:

**Fastur limur:** Kristian Martin Petersen

**Varalimur:** Annika Rasmussen

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- **Gøtunavnanevndin:**

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja Asbjørn Berthelsen, Petur Martin Petersen og Petur Abrahamsen.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- **Val av umboðum í skúlastýrið fyri Fuglafjarðar skúla:**

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja Birgir Petersen og Siggu Óladóttir Joensen sum kommualu umboðini í skúlastýrið og Dánjal Vang og Petur Abrahamsen sum varaumboð fyri ávikavist Birgir Petersen og Siggu Óladóttir Joensen.

**Hinir umboðini eru:**
Gudny Vang, foreldraumboð
Sofus Gregersen, foreldraumboð
Margareth D. Djurhuus, foreldraumboð
Maria Eldevig, umboð Námsfrøðisliga ráðið

Vísandi til § 50, stk. 2,1 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um "fólkaskúlan, seinast broytt við L.L. nr. 128 frá 22. desember 2000 skal kommunustýrið velja 2 umboð sum fylgja valskeiðnum.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- ***Val av valnevnd til skúlastýrisval fyri Fuglafjarðar skúla:***

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja:

Vagn Foldbo, skúlastjóra, sum eisini er formaður
Gudny Vang umboð fyri fráfarandi skúlastýri
Dan Reinert Petersen umboð fyri kommunustýrið

Í hesum sambandi verður víst til §4, stk. 1 um skúlastýri, har tað er ásett, at kommunustýrið setur eina valnevnd til hvønn sjálvstøðugan skúla sær, somuleiðis sum greitt stendur, hvørjir hesir limir skulu verða.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- **Val av Fuglafjarðar søgu nevnd:**

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja Steffen Stumann Hansen, Evald Johannesen, Petur Martin Petersen, Jónu Lindenskov, Frits Johannesen og Jann Toftegaard.

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- **Val av arbeiðsbólki "Framtíðar skúlaskapur í kommununi":**

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja niðanfyri standandi persónar í arbeiðsbólkin:

Árant Berjastein, býráðslim og formann í mentamálanevndini
Sonna á Horni, borgarstjóra
Siggu Óladóttir Joensen, býráðslim
Eyðun á Lakjuni, býráðslim
Magnus S. Midjord, býráðslim
Pætur Joensen, býarverkfrøðingur
Irena Olsen, leiðari sosiala deildin
Jógvan Philbrow, leiðari Stropin
Vagn Foldbo, skúlastjóra
Maria Eldevig, Námsfrøðisliga ráðið
Kristian Martin Petersen, skrivara í nevndini

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- **Val av arbeiðs/hugskotsbólki í sambandi við eldrabygging vm.:**

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja niðanfyri standandi persónar í arbeiðsbólkin:

Eyðun á Lakjuni, býráðslim
Siggu Óladóttir Joensen, býráðslim og forkvinnu í sosialu nevndini
Magnus S. Midjord, býráðslim
Dánjal Vang, býráðslim
Pætur Joensen, býarverkfrøðing (Helga Hansen, byggifrøðing)
Sunniva á Lakjuni, leiðari á Giljagarði

Marianna Hansen, leiðara á Vesturstovu
Irena Olsen, leiðara á sosialu deildini
Unna Næs Petersen, sjúkrarøktarfrøðing

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

- ***Val av nevnd í sambandi við bygging av dagstovni á Kambsdali:***

Uppskot frá Sonna á Horni á lista D um at velja niðanfyri standandi persónar í nevndina:

Sigga Óladóttir Joensen, býráðslimur
Petur Abrahamsen, býráðslimur
Sonni á Horni, borgarstjóri
Pætur Joensen, býarverkfrøðingur
Irena Olsen, leiðari á sosialu deildini
Jógvan Philbrow, leiðari á Stropanum

**Avgerð:**
Uppskotið varð samtykt. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 16.45.

| | | |
|---|---|---|
| Dánjal Vang | Magnus S. Midjord | Sigga Óladóttir Joensen |
| Eyðun á Lakjuni | Petur Abrahamsen | Árant Berjastein |
| Sigurð S. Simonsen | Sonni á Horni | Birgir Petersen |

// Jákup Frants Larsen